Fróðskaparsetur Føroya

13. desember 2007

**Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 9/2007**

Dagur og klokkutíð: Hósdagin 13. desember 2007, kl. 13

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi:
Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, varamegindeildarráðsf. fyri FMD
Rúna Hjelm, setursskrivari
Malan Marnersdóttir, megindeildarráðsf. fyri FMD kundi ikki møta

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 8/2007 setursráðsfundi 13. november 2007.**
   Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
   Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fíggjarlógarjáttanin 2007. Status frá deildunum.** (J.nr. (3) 10-12-20070002).
   Deildarleiðararnir og setursskrivarin kunnaðu um status viðvíkjandi seinastu fíggjartølunum hjá deildunum. Mett var, at deildirnar koma at brúka alla fíggjarjáttanina fyri 2007.

   Av játtanini fyri SSS, Felags og Ógreinað verða gjørdar íløgur í KT-økið. Hetta eru íløgur, ið koma øllum deildunum til góða. Ætlanin er, millum annað, at gera íløgur í eina diskskipan 2,4 TB (kr 60.000), switchar til FMD, NVD, SSS og SSD (tils. Kr. 100.000), eina køliskipan til ambætarastovuna (uml. Kr. 50.000) og at skifta út Sleipnir (kr. 62.000).

4. **Fíggjarstýring 2008** (J.nr. (3) 10-11.01-20070001)

a. **Leggja fíggjarætlan fyri hvønn ársfjórðing og eftirkanna nýtslu og staðfesta hall/avlop so hvørt.**
   Góðkent.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

**b. Gera yvirlit tørv á KT-útgerð og aðrari útgerð.**
Samtykt var, at deildarleiðararnir skulu hava ein fund við KT-leiðara Óla Simonsen um tørv og raðfestingar á KT-økinum. Harafturat var samtykt, at á setursráðsfundi í februar skulu deildarleiðararnir hava gjørt eitt yvirlit og eina raðfesting viðvíkjandi tørvi á ymiskari útgerð á deildunum.

5. **Varðveitsla av uppgávum og próvtøkusvørum. Uppskot til reglur.** (J.nr. (3) 10-46-20070018).
Samtykt var at lata uppskot um varðveitslu av uppgávum og próvtøkusvørum út til deildirnar til viðmerkingar. Málið verður tikið upp aftur til næsta setursráðsfundi.

6. **Reglur fyri samskifti á Fróðskaparsetrinum millum lærarar/starvsfólk og studentar.** (J.nr. (3) 10-00-20070005).
Málið var lagt fram og samtykt var at taka tað uppaftur á næsta setursráðsfundi.

7. **Upptøka lestrarárið 2008/09.** (J.nr. (3) 10-40-20070011).
Hans Pauli kunnaði um upptøku á NVD 2008/09. Á deildini arbeiða tey við at skipa 3 nýggjar útbúgvingar fyri skúlaárið 2008/09. Hesar útbúgvingar eru: KT-frøði, jarð- og havfrøði og lívfrøði. Fyribils skeiðslýsingar fyri útbúgvingarnar verða klárar fyrst í 2008. Ætlanin er at taka næmingar upp hvørt ár.
NVD hevur ætlanir um at fáa eitt samarbeiði í lag við Læraraskúlan um møguliga at stuðla útbúgvingum av lærarum.
Hans Pauli tók eisini upp marknaðarføring av útbúgvingum á Setrinum. Hann helt, at tað kundi verið eitt gott hugskot, at Setrið saman gjørdi marknaðarátøk hesum viðvíkjandi. Tí, sum hann tók til, at Setrið hevur brúk fyri at gerast meiri sjónligt.
Elin Súsanna kunnaði um, at SSD ikki fór at taka nýggjar næmingar inn í skúlaárinum 2008/09.
Turið á FMD kunnaði um, at FMD hevur ætlanir um at taka nýggjar næmingar inn í 2008/09. Hetta er í fakinum: Støðisnám í føroyskum. FMD tekur nýggjar næmingar inn annað hvørt ár. Í hesum sambandi er tað ein trupulleiki at skaffa lærarar til undirvísingina, men rokna verður við, at trupulleikin verður loystur tíðliga næsta ár.

8. **Uppskot um felags keyp av orðabókum frá Sprotanum.** (J.nr. (3) 10-37.01-20070001).
Samtykt var, at deildarleiðararnir finna út av, hvør tørvurin er á orðabókum á deildunum og síðani taka málið upp á næsta setursráðsfundi.

9. **Fullíggjað yvirlitið yvir granskingarúrslit, undirvísingartímar og avrik annars gerast til heimasíðuna.** (J.nr. (3) 10-71-20070001).
Samtykt var at deildarleiðararnir fylgja málinum. Oyðublað verður sent elektroniskt út til deildirnar.

10. **Fundaætlan várhálvu 2008.** (J.nr. (3) 10-01-20070010).
Fundirnir í várhálvuni 2008 verða: 24.01, 21.02, 27.03, 23.04, 22.05 og 19.06

11. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 29.11.07.** (J.nr. (3) 10-01-20070002). Onki at leggja afturat.
   b. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 10.12.07.** (J.nr. (3) 10-01-20070004). Fundurin er hildin, men frágreiðingin er ikki liðug viðgjørd. Málið verður tikið upp aftur á næsta setursráðsfundi.

Avgreiðslumál:

12. **Val av vararektara. Hans Pauli Joensen er millum funda valdur til vararektara fyri tíðarskeiðið 1.12.07 – 30.11.08. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-01-20070012).
Staðfest.

13. **Eftir áheitan frá Náttúruvísindadeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Frank Hauser, lektara, Ph.D. sum próvdómara *Innan lívfrøði.* At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-25-20070001).
Staðfest.

14. **Ráðgevandi ráðið fyri Stuðulsstovnin. Rúna Hjelm verður umboð setursins í ráðnum og Eir í Ólavsstovu varaumboð. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-01-20070011).
Staðfest.

Kunningarmál:

15. **Bræv frá Háskúla Íslands um víðkað samstarv við Setrið.** (J.nr. (?) )
Tikið verður undir við, at arbeitt verður víðari við hesum málinum, og at Setrið sendir eitt positivt aftursvar til Háskúla Íslands.

16. **Mánaðarjavni ultimo oktober 2007, nýtsla fyri alt setrið 14.590.900 kr = 73,9% av játtanàrkarmi uppá 19.749.000 kr.** (J.nr. (3) 10-12-20070002).
Staðfest.

17. **Samskipanin av Granskingardeplinum fyri Samfelagsmenning og Fróðskaparsetrinum fær gildi frá 1. januar 2008. Avtala er gjørd millum partarnar um fyrisiting, starvssetanar og høli. Søgu- og Samfelagsdeildin og Granskingardepilin skulu gera avtalu um undirvísing og gransking.** (J.nr. (3) 10-03-20070005).
Elin Súsanna kunnaði um tilgongdina viðvíkjandi samstarvinum millum Fróðskaparsetrið og Granskingardepilin fyri Samfelagsmenning. Hetta arbeiði er komið væl áleiðis, men enn eru nakrir snøklar eftir at avgreiða, millum annað viðvíkjandi undirvísingarskyldu hjá Granskingardeplinum mótvegis SSD.

18. **Magistarafelagið hevur fingið nýggjan sáttmála. Tá ið lønarreguleringarnar til leyslønt/tímaløent verða gjørdar, verður upphæddir minni enn 100 kr ikki ávístar.**
Staðfest.

19. **Útgávur:**

a. **Ársfrágreiðing 2006, Jarðfeingi**
b. **Nordforsk Magasin, Tema: Globalisering, Nordforsk 2007**
c. **Aarhus Universitet 0708, Aarhus Universitet tal og tabeller 2007, Aarhus Universitet kort 2007**

Frágreiðing: Rúna Hjelm